Góðu bygdafólk, skótar, úlvar og foreldur!

Hósdagin 14. januar eru 30 ár liðin síðani KFUM-skótarnir í Kvívík vórðu stovnaðir.

Í hesum sambandi verður barna-Guðstænasta leygardagin 16. januar kl 14. Hóast vit kalla hetta barna-Guðstænastu eru sjálvandi øll vælkomin.

Aftaná Guðstænastuna leygardagin verður skrúðgonga frá Kirkjuni og niðan í Glæmuna, har móttøka verður frá umleið 15 til 18. Øll eru hjartaliga vælkomin- bæði stór og smá. Í Glæmuni verður t.d. skipað fyri framsýning av tiltøkum o.ø. frá hesum farnu árum og fram til dagin í dag. Eisini bjóða vit smyrjibreyð, køku o.a. umframt okkurt drekkandi.

Framsýningin verður eisini opin sunnudagin kl 15 til 17.

Eisini vilja vit við hesum takka tykkum fyri allan stuðul tit hava latið okkum hesi 30 árini. Uttan tykkara stuðul høvdu vit ikki kunnað virkað sum vit gera.

Vinarliga KFUM- skótarnir í Kvívík